HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

Tórshavn, 9. februar 2010
Mál: 0.15-200700084/118
Viðgjørt: JS

**Løgtingsmál nr. F-3/2009: Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini um krabbameinsætlan fyri Føroyar**

**Frágreiðing**
**til**
**aðalorðaskiftis**

Landsstýrismaðurin í heilsumálum leggur við hesum “Krabbameinsætlan fyri Føroyar” til aðalorðaskifti.

Krabbameinsætlanin varð handað undirritaða landsstýrismanni í oktober 2009. Høvuðsendamálið við ætlanini hevur í stuttum verið at betra um grundarlagið at bjóða føroyskum krabbameinssjúklingum útgreiningar- og viðgerðargongdir, ið verða settar í verk tíðliga, kennast samanhangandi fyri sjúklingin og hava høga altjóða fakliga dygd. Endamálið hevur eisini verið at styrkja um fyribyrgingina av krabbameini. Harumframt skuldi atlit eisini takast til endurmenning og tann palliativa (linnandi) innsatsin, umframt hvørji tiltøk kunnu verða sett í verk fyri at styrkja um krabbameinsgranskingina í Føroyum.

Eg havi longu í ávísan mun tikið hesa ætlan til mín, og eri farin undir at íverkseta nøkur av tilmælunum. Á fíggjarlógini fyri 2010 er peningur settur av til nýggjan CT-scannara, og ætlanin er at fáa til vega ein nýggjan MR-scannara og ein nýggjan mammograf í ávikavist 2011 og 2012. Í sambandi við ta skipan, ið sett varð í verk at kanna føroyingar fyri CTD, er sett á stovn ein *screeningseind* á Landssjúkrahúsinum, sum krabbameinssjúklingar, við atliti til screeningsátøk, eisini fáa gleði av í framtíðini. Eisini er farið undir fyrireikingararbeiðið at lóggeva móti solarium, soleiðis at solarium verður bannað fyri ung undir 18 ár. Eisini er arbeiði setti í verk, har kommunlæknaskipanin í løtuni verður nútímansgjørd, samstundis sum ferð er sett á at útbúgva fleiri kommunulæknar. Nevnast kann í hesum sambandi, at tríggir nýggir kommunulæknar byrja í útbúgvingarstørvum 1. mars í ár.

Í ætlanini eru nøkur tilmæli, ið fíggjarliga krevja fleiri ressursir, og har tað verður neyðugt við eini neyvari politiskari viðgerð. Til dømis verður mælt til, at sett verður í verk ein landsumfatandi mammografiscreening eins og í okkara grannalondum, og at onkologiskipanin verður víðkað umframt at meiri peningur verður játtaður til krabbameinsgransking.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

**Verandi støða**
Um hugt verður eftir verandi støðu á krabbameinsøkinum í Føroyum, hava Føroyar sambært Krabbameinsætlanini í fleiri førum færri tilburðir av krabbameini enn hini Norðurlondini. Tá ið tað snýr seg um deyðiligheit harafturímóti, hava vit nógv sløg av krabbameini við hægstu deyðiligheit. Tað er sera trupult at siga, hví støðan er soleiðis í Føroyum, men tað er týdningarmikið at finna orsøkina til hesi viðurskifti. Ein av orsøkunum kann vera manglandi skráseting. Fyri at kunna útihýsa so mongum feilkeldum sum gjørligt, er tað rættiliga umráðandi, at skrásetingin av krabbameinstilburðum er neyv. Tað verður neyðugt at uppraðfesta skráseting, eftirlit og uppfylging av føroysku krabbameinshagtølunum. Millum annað verður í ætlanini mælt til, at krabbameinshagtølini eina ferð árliga verða greinað við tí fyri eyga at meta um gongdina viðvíkjandi deyðiligheit, nýggjum tilburðum o.s.fr.

Fyri at kunna raðfesta og fyrireika innsatsin á krabbameinsøkinum í Føroyum, er tað eisini neyðugt at fáa eitt yvirlit yvir bæði *prevalensin*, t.e. tal av persónum, sum eina ávísa tíð liva við krabbameinssjúku, og *yvirlivingina*, t.e. hvussu nógv yvirliva eftir eina krabbmeinsdiagnosu – til dømis 5 ára yvirliving. Hesi hagtøl mangla í Føroyum í løtuni, og tí hevur tað týdning at fáa sett skjøtul á at fáa hesi tøl til vega. Hetta fari eg saman við míni fyrisiting at leggja eina ætlan fyri – í tráð við tilmælini í krabbameinsætlanini.

**Krabbameinsætlanin**
Henda krabbameinsætlan, ið er tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum, hevur ikki færri enn 58 tilmælir um at betra viðurskiftini á krabbameinsøkinum í Føroyum. Arbeiðsbólkurin metir, at tilmælini fara at betra um yvirlivingina hjá sjúklingunum og betra dygdina á teimum veitingum, ið verða bjóðaðar krabbameinssjúklingum.

Samstundis kann henda ætlan vera við til at tryggja og gera yvirskipaðu rættindini hjá sjúklingunum meira sjónlig í viðgerðargongdini og harafturat skylduna hjá heilsuverkinum at veita ta neyðugu tænastuna.

Krabbameinsætlanin er eitt væla verk, ið eg ikki meti skal goymast burtur orsakað av fíggjarstøðuni í landinum. Ætlanin kann lýsast sum eitt neyðugt amboð, ið skal nýtast í eini miðvísari tilgongd, har tað støðugt skal arbeiðast við at dygdarmenna tær veitingar og tænastur, ið okkara heilsuverk skal bjóða borgarum við atliti til at fyribyrgja og viðgera krabbamein.

Fyri at tryggja eina miðvísa tilgongd, har tilmælir í ætlanini verða sett í verk, fari eg skjótast gjørligt at seta ein tvørfakligan krabbameinsstýrisbólk. Hetta er samstundis í tráð við tilmæli í ætlanini. Bólkurin skal m.a. ráðgeva mær og Heilsumálaráðnum í spurningum viðvíkjandi krabbameini og fylgja við í, at tilmælini í krabbameinsætlanini leypandi verða sett í verk.

Umframt diagnostisering, útgreining og viðgerð, sum beinleiðis eru partar í eini sjúklingagongd, verður í ætlanini eisini sett fokus á *fyribyrging*, *screening, endurmenning* og *palliatión*.

Tá ið tað viðvíkur *fyribyrging,* er nógv hent tey seinastu árini í sambandi við, at tilmælini í fólkaheilsuætlanini frá 2006 í stóran mun eru sett í verk. Enn finnast tó fyribyrgingarmøguleikar, sum eru nágreinaðir í krabbameinsætlanini, viðvíkjandi royking, rørslu, kosti, rúsdrekka og solarium, ið eiga at troytast. Hesar møguleikar fari eg at viðgera saman við Fólkaheilsuráðnum.

Vanligastu *screeningshættirnir* innan krabbamein eru fyri lívmóðurhálskrabba og bróstkrabba (mammografi). Flestu av okkara grannalondum hava sett landsumfatandi screeningar í verk fyri bæði hesi øki. Í Føroyum verður einans bjóðað reglulig landsumfatandi screening fyri

lívmóðurhálskrabba, men í ætlanini verður mælt til, at landsumfatandi screening eisini verður sett í verk fyri bróstkrabba. Eg fari at senda hetta tilmælið til viðmerkingar hjá Landssjúkrahúsinum fyri at fáa nágreinað møguleikarnar at seta tilmælið í verk, og fáa eina nágreiniliga kostnaðarmeting í hesum sambandi.

Harafturímóti er langt eftir á mál, tá tað snýr seg um *endurmenning*. Arbeiðsbólkurin metir, at endurmenningin er av alstórum týdningi fyri viðgerðargongdina hjá krabbameinssjúklingum, og at hetta økið er raðfest alt ov lágt í Føroyum. Bólkurin hevur valt at seta fokus á nakrar av trupulleikunum, sum føroyskir krabbameinssjúklingar javnan eru fyri, og kemur við uppskotum um ábøtur og loysnir. Eg fari at taka spurningin upp saman við míni fyrisiting, um hvussu vit fáa sett skjøtul á hetta týdningarmikla arbeiðið, sum í stuttum snýr seg um, hvussu vit tryggja, at endurmenning verður ein natúrligur partur av viðgerðartilboðnum til allar krabbameinssjúklingar, umframt aðrar sjúklingar, í Føroyum. Endurmenningin skal byrja beinanvegin, sjúklingurin fær diagnosuna.

Tá ið tað viðvíkur *palliatión,* er eisini nógv hent seinastu árini. Talan er í hesum sambandi um linnandi viðgerð, ið verður veitt, tá lekjandi viðgerð ikki longur er møgulig.

Palliativa toymið byrjaði at virka í 2007, og heldur til á Landssjúkrahúsinum. Uppgávan hjá toyminum er at vegleiða heilsustarvsfólkum, sum hava við palliativar sjúklingar at gera, umframt at toymið eisini er á heimavitjan hjá sjúklingum. Palliativa eindin lat upp í mars 2008, og heldur til á B6 á Landssjúkrahúsinum. Eindin hevur tvær stovur, sum eru innrættaðar til endamálið, t.v.s. at pláss er fyri tveimum sjúklingum í senn.

Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á felags mannagongdum fyri viðgerð og røkt av hesum sjúklingabólki. Tørvur tykist eisini vera á, at palliativa toymið, palliativa eindin og onnur, sum hava við palliativar sjúklingar at gera, hava eitt meira regluligt tvørfakligt samstarv. Fyri at greina hesi viðurskifti nærri, hevði tað verið hóskandi at eftirmett skipanirnar við palliativu eindini og palliativa toyminum við tí endamáli at betra um skipanirnar. Eg ætli mær at skipa soleiðis fyri, at hesar skipanir verða eftirmettar skjótast gjørligt.

Tað skerst ikki burtur, at tað, sum størstur dentur verður lagdur á í ætlanini, er at viðgera, hvussu vit kunnu betra um tey viðurskifti, sum eru partar av eini *sjúklingagongd,* og at hendan skal verða so samanhangandi sum gjørligt.

Í øðrum londum er avbjóðingin at samskipa sjúklingagongdirnar millum kommunulæknar og sjúkrahús og millum sjúkrahús innanlands. Í Føroyum er avbjóðingin enn størri, tí krabbameinsviðgerðin harafturat skal samskipast tvørtur um landamørk, av tí at meginparturin av viðgerðini gongur fyri seg uttanlands. Í ætlanini er í hesum sambandi eitt áhugavert tilmæli um at skipa sonevndar *heildartilgongdir*. Ein heildartilgongd er ein sjúklingagongd, har hvørt einstakt stig er lagt soleiðis til rættis, at hendingarnar í sambandi við tíð og innihald eru vællýstar og ganga eftir eini frammanundan bókaðari gongd. Heildartilgongdir innihalda alla sjúklingagongdina frá tí, at grundaður illgruni er um krabbamein, gjøgnum útgreining, diagnosu, viðgerð og eftirviðgerð.

Í Føroyum er onki hámark sett fyri bíðitíðir í einstøku liðunum í sjúkugongdini, og tí er tað upp til hvønn einstakan lækna sjálvan at meta um, hvat er stytst møguligt. Í ætlanini verður mett, at krabbamein skal roknast sum ein akutt sjúka, sum hevur tørv á akuttari útgreining og viðgerð. Tí eiga vit í Føroyum at evna til systematiskar sjúklingagongdir, sum áseta hámark fyri bíðitíðir fyri tey einstøku liðini í sjúklingagongdini.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað fyri hvørja einstaku krabbameinsdiagnosu eiga at verða gjørdar niðurskrivaðar heildartilgongdir, sum líkjast donsku sonevndu "pakkaforløbunum", men sum tó taka hædd fyri serligum føroyskum viðurskiftum. Hetta arbeiðið meti eg, er týdningarmikið at fara undir í nærmastu framtíð.

Í hesum sambandi er eisini eitt tilmæli um, at settur verður ein sjúklingasamskipari (forløbskoordinatorur) í sjúkrahúsverkinum, sum skal samskipa sjúklingagongdirnar. Talan skal verða er um eina royndarskipan, sum skal eftirmetast eftir eitt ár.

Krabbameinsætlanin setir eisini fokus á *sjúklingarættindi*. Í hesum sambandi verður millum annað mælt til, at ein viðgerðartrygd, sum ásetur mest loyvdar bíðitíðir, verður sett í verk, og at ein lóg um sjúklingatrygging verður sett í verk í Føroyum.

Viðvíkjandi sjúklingatrygging skal nevnast, at Heilsumálaráðið samskiftir við danskar myndugleikar í løtuni við tí fyri eyga at fáa sett donsku lógina um sjúklingatrygd í gildi fyri Føroyar.

Harumframt er ætlanin at endurskoða sjúkrahúslógina frá 2005 í nærmastu framtíð, og í hesum sambandi verður spurningurin um viðgerðartrygd viðgjørdur. Skulu vit hava lógarásetta viðgerðartrygd í Føroyum, verður neyðugt at broyta sjúkrahúslógina í samsvar við hetta.

Umframt at seta fokus á tey viðurskifti, sum beinleiðis hava við krabbameinssjúklingin at gera, verður í ætlanini eisini sett fokus á *krabbameinsgransking*. Gransking kann sum heild hava stóran týdning fyri menningina og fyri at halda fast í vitan og skikkaðum starvsfólki í føroyska heilsuverkinum. Eisini fer granskingin væntandi at hava við sær betri diagnostikk, viðgerð og ráðgeving. Úrslitini frá granskingini fara væntandi eisini at økja um áhugan og tilvitanina um økið. Hóast føroyska íkastið til krabbameinsgransking sum heild valla hevur útlit til at ganga undan, kann hugsast, at dátur og vevnaður úr Føroyum innanfyri ávís útvald øki kunnu fáa rímiliga stóran týdning í samstarvinum við útlendskar granskaraeindir.

Við atliti at tilmælunum í ætlanini ætli eg mær, í samráð við Krabbameinsfelagið og Ílegusavnið, at arbeiða fyri, at so góðir karmar sum gjørligt verða skaptir til krabbameinsgranskingina.

**Samanumtøka**
Tað skal ongin ivi valda um, at tað hevur stóran týdning at fáa viðgjørt krabbameinsøkið politiskt. Millum annað fara broytingar at verða í íbúgvaratali og samanseting í Føroyum, har vit kunnu vænta, at talið av eldri yvir 65 ár miðvíst fer at økjast komandi árini. Sambært framskrivingum fer talið at verða tvífalt tey næstu 40-50 árini, meðan talið av yngri fólki verður lutfalsliga minni. Hetta fer at leggja stórt trýst á viðgerðarskipanina, ikki minst í sambandi við krabbameinsviðgerðir, av tí at tað serliga eru eldri fólk, ið verða rakt av krabbameini.

Hugsa vit um tørvin á eini krabbameinsætlan, er eisini týdningarmikið at nevna, at fleiri heilsufaklig viðurskifti, ið viðvíkja hesum øki, hava verið frammi í politiska orðaskiftinum og til støðutakan í Føroyum, uttan at politikararnir hava havt haldgott grundarlag at viðgera hesi viðurskifti út frá. Til dømis kunnu nevnast evnir sum mammografiscreening, hospice, koppsetingar, solarium v.m. Krabbameinsætlanin vil vera eitt gott grundarlag, tá tílík viðurskifti skulu viðgerast politiskt í framtíðini.

Eg ætli mær so at brúka Krabbameinsætlanina saman við niðurstøðunum frá orðaskiftinum í Løgtinginum, sum grundarlag fyri at fara undir fyrireikingarnar at seta tiltøk í verk og fremja neyðugar tillagingar í heilsuverkinum skjótast gjørligt eftir aðalorðaskiftið. Hetta fyri at tryggja,

at vit, við atliti at krabbameinsøkinum, í framtíðini í størri mun fáa fyribyrgt krabbamein í Føroyum - og tá sjúkan rakar, fáa veitt eina dygdargóða viðgerð á altjóða stigi til gleði fyri fyrst og fremst teir føroysku sjúklingarnar, men eisini fyri tey starvsfólk, ið starvast innan heilsuverkið.

Við hesum orðum vóni eg, at vit fáa eitt gott, mennandi og framskygt orðaskifti um Krabbameinsætlanina fyri Føroyar.

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður